**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
International Life Saving Federation (ILS)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Toftir 16. apríl 2020

# Venjingartilmæli SSF í sambandi við Corona

Sum mennt út í frá uppskotum frá svimjifeløgunum, og í samráð við coronaráðgevingina

- Í mesta lagi 10 eiga at vera til eina venjing í senn
- Tað eru altíð somu bólkar sum venja í senn
- Frástøða á minst 2 metrar eigur at haldast av øllum allastaðni, so sum í móttøkuni, í umklæðingini, undir brúsuni, á kantinum og í hylinum
- Um svimjarar svimja aftaná hvørjum øðrum, so eigur frástøðan at vera minst 4 metrar millum hvønn svimjara, tann vegin sum tey svimja
- Øll halda seg til at nýta einans persónliga útgerð, og lána ongum sítt, so sum t.d. svimjibrillur, fitjur, snorkil, plátur, vatnfløskur, hettur, stopp-ur og klæðir
- Alt persónligt verður goymt við somu frástøðu á minst 2 metrum, og gjarna í persónligari tasku ella í persónligum skápi
- Hitarúm og líknandi verður ikki brúkt
- Følir svimjarin seg sjúkan, skal hann/hon verða heima
- Hevur svimjarin fepur ella turran hosta (sjúkuteknin uppá COVID-19), skal svimjarin testast áðrenn hann/hon kann venja aftur
- Svimjararnir eiga at fáa greið boð um hesar venjingarreglur, áðrenn fyrstu venjing
- Øll uppmøting eigur at skrásetast neyvt, so at til ber at síggja hvør ið møtti nær

Vegna Svimjisamband Føroya

Rókur í Jákupsstovu, formaður

ATLANTIC AIRWAYS